28.04.2016

**Reglugerð fyri Tilhaldið í Tórsgøtu**

§ 1

Navn tilhaldsins er Tilhaldið í Tórsgøtu. Tilhaldið er tilboð skipað í Heilsu- og umsorganartænastuni.

§ 2

Endamál Tilhaldsins er samsvarandi eldrapolitikki býráðsins at geva pensiónistum í Tórshavnar kommunu møguleika at møtast til fjøltáttað virksemi og samveru bæði til likams og sálar, at økja um lívsgóðskuna við fyribyrgjandi og heilsufremjandi tilboðum, og at skipa fyri trivnaðarligum tiltøkum í hugnaligum umhvørvi.

Miðast skal í virkseminum eftir at røkka so mongum áhugamálum sum til ber.

Gjørd verður yvirskipað ársætlan og við støði í henni neyvari skrá fyri virksemið hvønn mánaða og hvørja viku, ið verður at almannakunngera.

§ 3

Tórshavnar kommuna eigur ognina Tórsgøta 21. Heilsu- og umsorganartænastan hevur evstu fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av Tilhaldinum.

§ 4

Heilsu- og umsorganartænastan setur og loysur úr starvi leiðara og onnur starvsfólk í Tilhaldinum. Leiðarin hevur dagligu ábyrgdina og eftirlitið við Tilhaldinum og av fíggjarliga rakstrinum sambært játtaðum fíggjarkarmi.

§ 5

Leiðarin hevur ábyrgdina av at fyriskipa tiltøkini og virksemið í Tilhaldinum. Øll nýtsla av hølunum skal fara fram í samráð við leiðaran.

Leiðarin eigur harumframt at samstarva við nevndina fyri Tilhaldið, stovnar, felagsskapir, sjálvboðin og onnur um tiltøk í Tilhaldinum og um viðkomandi tiltøk fyri pensjónistar í býnum annars.

§ 6

At røkja áhugamál pensiónistanna í Tilhaldinum verður nevnd vald við 5 umboðum og 2 varaumboðum. Valrætt hava brúkarar Tilhaldsins. Nevndin verður vald á grækarismessu 12. mars á hvørjum ári.

Nevndarumboðini verða vald fyri 2 ár í senn. Nevndarumboð kunnu verða afturvald.

Nevndin hevur fund í minsta lagi eina ferð um mánaðin.

§ 7

Eldraráðið í Tórshavnar kommunu hevur skrivstovuhøli í Tilhaldinum og kann hava sínar fundir har. Eldraráðið hevur atgongd til felagshentleikar.

Eldraráðið, nevndin fyri Tilhaldið og leiðarin hava í minsta lagi tveir fundir árliga saman at umrøða virksemið í Tilhaldinum og ætlanir v.m.

§ 8

Hesar reglur og broytingar í hesi reglugerð verða at góðkenna av trivnaðarnevndini og fíggjarnevndini í Tórshavnar kommunu, áðrenn tær fáa gildi.

Soleiðis samtykt á býráðsfundi tann 19. mai 2016.